

Mong kend andlit frá dansiumhvørvinum í høvuðsstaðnum vóru við til hátíðarligu løtuna, tá spakin varð settur í



Jógvan Arge, varaborgarstjóri, saman við formanninum í Bygginevndini, Høgna Mikkelsen

ina, sum verður mett at kosta einar 10 mill. kr. Tórshavnar kommuna hevur eisini tryggjað sær at kunna leiga hølini onkur vikuskifti og eisini vanligar dagar, har Dansifrøi ikki tørvar hølini so nógv. Hetta kanska serstakliga um summarið. Sum Sosialurin skilur tað, so er ætlanin hjá kommununi at skipa fyri onkum ungdómsvirksemi har, ið líkist tí, sum í dag fer fram í Margarinfabrikkini. Tvs. at við hesum hølunum vil kommunan skapa nýggjar karmar til ungdómin. Og hølini eru eisini einstandandi væl egnað til slíkt endamál. Tí umframt eitt stórt dansigólv er eisini stórur pallur og áskoðarapláss., soleiðis at hølini kunnu brúkast til konsertir.

Tað fer at bera til at hava borðhald har fyri 300 fólkum, og verður skipað fyri eini konsert, so kunnu hølini hýsa 700 fólkum. Hóast hølini koma at liggja í einum bóltsøki, so er tað ikki egnað til bóltspæl men haraftur-ímóti til dans, tónleik, fundir, samkomur ol.

## Menna dansin

Erling Jørgensen sær fyri sær, at tá hølini verða tikin í brúk, verður kanska eisini møguleiki fyri veruliga at menna dansiumhvørvið í høvuðsstaðnum, har fleiri ung og eisini tilkomin kunnu gerast limir. Hann sær eisini fyri sær møguleikan at skipa fyri kappingar ala "Vild med dans" ol.

Og hølini kunnu so aftur fáa fleiri útlendsk dansifeløg at koma henda vegin.

Í dag eru seks virkin dansifeløg í landinum, í Havn, Suðri, Sandoy, Vágum, Sundalagnum og Klaksvík. Eisini í Runavík eru tey sinnað at leggja til brots. Erling Jørgensen heldur tað er gott, at ikki minst tey ungu, sum kanska ikki eru so fegin um ítrótt, eisini hava henda møguleikan at njóta gleðina at dansa og samtíðis at kunna røra seg. Hetta ítrívið er sera heilsugott heldur hann.

Hann vónar at síggja nógvar nýggjar limir, tá hølini verða liðug og leggur aftrat, at eingin skal halda seg aftur, tí tað krevur ongan førleika at kunna vera við. Felagið skipar fyri undirvísing, har nýggir limir kunnu læra dansistev og mongu dansirnar, sum er partur av skránni.

## -Hví velja hetta ítrívið?

-Tí tað er so stuttligt og gott fyri sál og likam. Hetta er kanska besta ítrívið, har t.d. maður og kona kunnu vera saman.

Tá vit tosa um dansir, so er hetta tað sama vit plaga at kalla "gamlamannadansir". Í veruleikanum er talan um fólkadans av ymsum slag. Í tí høpinum verður í Føroyum oftani hugsað um føroyskan dans. Og tað er jú ikki tað slagi av dansi.



Tað er Magnus Hansen, arkitektur, sum hevur teknað nýggja dansihúsið



Húsið verður bygd í Gundadali vestan fyri R. C. Effesøesgøtu, millum Ítróttarhøllina á Hálsi og Gundadalshøllina, og við Tórsvølli stadion sum næsta granna